FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 5. sept. 2023

Hoyringarskriv til uppskot um broytingar í lóg um toll og lóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi

Fíggjarmálaráðið hevur sent tvey lógaruppskot til hoyring, og tey snúgva seg um broytingar í løgtingslóg um toll og løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Samanumtikið hava uppskotini til endamáls at leggja toll og avgjøld á innflutning og sølu av HFC-gassum við tí fyri eyga at minka um føroyska útlátið av vakstrarhúsgassum. Talan er um týðandi broytingar fyri tey skip, sum nýta ymisk sløg av HFC-gassum, sum nú gerast munandi meira kostnaðarmikil at keypa og nýta.

Reiðarafelagið ásannar, at ávís sløg av f-gassi ikki skulu nýtast um nøkur ár sum liður í einum felags veðurlagspolitikki, ið er ásettur í altjóða sáttmálum. Tó er neyðugt, at skiftistíðin verður skipað soleiðis, at tey fiskiskip, sum nýta hesi f-gass, hava ein rímiligan møguleika at leggja um til aðrar skipanir ella at skifta skipini út við nýggjari skip.

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll

Skrivað stendur í viðmerkingunum, at lógaruppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri vinnuna. Hetta er ikki rætt, tí at endamálið við uppskotinum júst er at áleggja toll á innflutning av f-gassum. Tað verður sjálvsagt dýrari hjá fiskiskipum at keypa f-gass til sínar køli- og frystiskipanir, og tí fer hetta lógaruppskotið at hava avleiðingar fyri tey fiskiskip, sum nýta hesi sløg av gassi. Raksturin av hesum fiskiskipum verður dýrari, og tí fer hetta at raka nøkur fiskiskip. Hetta eigur at standa í viðmerkingunum, soleiðis at løgtingið hevur eina rættvísandi mynd av avleiðingunum.

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi

Tað eru serliga avgjøldini í kapitul 29 og 38 í frumskjali til toll- og vøruskránna, sum fara at hava avleiðingar fyri fiskiskip. Talan er um eina fleirfalding av núverandi prísum fyri hesi sløg av gassi, og hetta fer at økja um rakstrarkostnaðin hjá fleiri fiskiskipum.

Umleið 25 føroysk fiskiskip nýta í dag nøkur av hesum f-gassum, sum nú gerast munandi meira kostnaðarmikil. Reiðarafelagið hevur víst á nøkur av hesum viðurskiftum í hoyringarskrivi viðvíkjandi eini kunngerð við nýggjum reglum um nýtslu av f-gassum. Hendan kunngerð var til hoyring fyrr í ár.

Tey størstu avgjøldini verða løgd á R404 og R507, har avgjaldið verður ávikavist 552 og 558 kr. pr. kg. Uppskotið hevur sostatt við sær, at prísurin fyri summi sløg av gassi verður umleið fimmfaldaður, so talan er um ógvusligar hækkingar, ið hendan lógin hevur við sær.

Viðmerkingarnar til lógina vísa til Kigalið-ískoytið frá 2016 um útfasing av HFC-gassi sum grundgeving fyri uppskotinum. Sum skilst sigur Kigali-ískoytið einki um, at avgjøld skulu leggjast á HFC-gass, men sigur bert, at

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo

hesi sløg skulu fasast út eftir einum ávísum leisti. Tí átti ikki at verið neyðugt at áleggja hesi avgjøld vegna altjóða sáttmálar ella líknandi.

Viðmerkingarnar vísa eisini til, at Løgtingið hevur samtykt ein veðurlagspolitikk, ið sigur, at útlátið av vakstrarhúsgassi skal minka við í minsta lagi 30% næstu 10 árini. F-gass eru síðani nevnd og fevnd av átaki 18 og 19. Tó sigur hesin veðurlagspolitikkur ikki nágreiniliga, hvussu peningurin frá hesum avgjøldum skal nýtast. Tí er tað átaluvert, at landsstýrið ikki ætlar at nýta peningin til t.d. umlegging til aðrar køli- og frystiskipanir hjá fiskiskipum.

Viðmerkingarnar vísa eisini á, at ætlanin er at seta í gildi kunngerð um f-gass í 2023, og at hendan kunngerð fer at minka um nýtslu og innflutning av f-gassi við 85% fram til 2036. Reiðarafelagið skal í hesum sambandi vísa til tað hoyringsskrivið, sum felagið sendi Umhvørvismálaráðnum um hesa kunngerð.

Viðmerkingarnar siga, at *"hjá vinnuni ber til at sleppa undan hesum meirkostnaðinum við at leggja um til onnur natúrlig køllievni (CO2 og ammoniak)".* Hetta ljóðar ógvuliga ómakaleyst, men talan er um sera stórar íløgur, ið skulu gerast hjá fleiri skipum fyri at leggja um til onnur køllievni. Tí hevði verið skilabetri at latið reiðaríini sleppa undan avgjaldi, men heldur at seta freistir fyri, nær hesi evni ikki kunnu nýtast meira.

Mett verður, at árliga meirinntøkan hjá landinum verður 10-15 mió. kr. frá 2024, og at hendan inntøkan fer at minka stigvíst fram til 2036. Ætlanin er, at bert ein partur av hesum inntøkum skal nýtast til at fíggja eina góðkenda innsavningar- og burturbeiningarskipan fyri f-gass. Talan er um eina stóra upphædd, sum verður kravd inn, men bert ein partur av henni skal nýtast til burturbeining og innsavning av hesum gassum.

Tískil ber hetta uppskotið brá av at vera eitt inntøkutiltak hjá landskassanum, har endamálið er at fáa til vega inntøkur til landið heldur enn at stuðla undir eina grøna umlegging í føroyska flotanum til meira umhvørvisvinarligar loysnir. Inntøkurnar frá hesum avgjaldi fara eftir øllum at døma í stóran mun til rakstur, men tær áttu heldur at verið nýttar til annað endamál.

Reiðarafelagið ásannar, at HFC-gass skulu útfasast komandi árini, av tí at tey hava avleiðingar fyri umhvørvið og elva til alheims upphiting. Tó eigur landsstýrið heldur at leggja eina ætlan, har eitt evstamark verður sett fyri nýtslu av hesum gassum, soleiðis at skipini kunnu skifta sínar køli- og frystiskipanir út, ella at skipini verða skift út. Um uppskotið kortini verður samtykt, eigur landsstýrið at nýta allan peningin, sum kemur inn, til at stuðla undir eina umlegging til meira umhvørvisvinarligar køli- og frystiskipanir.

Greitt er, at hesin politikkur fer at raka tey smærru reiðaríini meint, tí at talan er um eina lutfalsliga stóra íløgu, sum skal gerast í nýggjar køli- og frystiskipanir, umframt at raksturin av hesum skipum gerst tyngri. Hesi reiðarí hava eisini trupult við at skifta skipini út vegna tungan rakstur og hava tí ilt við at keypa ella byggja nýggj skip, sum ikki nýta hesi evni.

Føroya Reiðarafelag vísir eisini til tað hoyringsskrivið, sum felagið sendi ísv. uppskot til samtyktar at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi komandi 10 árini. Reiðarafelagið er sinnað at møta á fundi við Fíggjarmálaráðið og Umhvørvismálaráðið um hesi viðurskifti, um tað er ynskiligt.

Vinarliga,

Stefan í Skorini, stjóri